# Ein várligur vindur, háveturstíð

**Komandi rektari á Nordisk Journalistcenter er Birgir Kruse. Við hesum baksýni hevur Sosialurin biðið hann geva eina meting av heimliga journalistikkinum og um tørvur er á teirri journalistisku eftirútbúgving, hann skal stjórna úr Århus**

*Birgir Kruse*
*birgir@nlh.fo*



*Ein várligur vindur, háveturstíð. Komandi NJC-rektarin Birgir Kruse í Havnardali við Triumph Spitfire bilinum hjá Eiriki Lindenskov*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*

Tað fyrsta, sum rennur einum í huga, nú jólini eru farin aftur um bak, og eitt nýtt ár stundar til, er bókin "Skjót journalistin". Í hvussu er, um evnið er journalistikkur. Tí í tveimum førum skrivar bókin søgu. Í fyrsta lagi tí, hetta er hin fyrsta føroyska bókin um journalistikk og í øðrum lagi tí, hetta er fyrsta bókin, ið hevur felt ein løgmann. Fýra dagar eftir útgávuna.

Um tíðarrøttu marknaðarføringina og hvørt Óli Breckmann varð bílagdur til útgávuherðferina, skal einki sigast um í hesum føri. Men við bókini er staðfest, at miðlarnir kunnu verða fjórða statsvaldið, fáa teir náðir til tess.

## Fólkaræði?

Miðlarnir, serliga teir almennu, siga stútt, at teir eru trygdin fyri einum fólkaræðisligum Føroyum. Og trygdin fyri fólkaræði yvirhøvur. Men hóast vit leita heilt aftur til fyrstu Útvarpssendingina í 1957 og fyrstu Sjónvarpssendingina í 1984, so er ilt at fáa eyga á nakra einstaka sending, ella sendirøð, sum kann sigast at hava tryggjað fólkaræðið ein givnan dag, ella hava elvt til so mikið av røringi í samtíðini, at yvirvøldin í eitt tíðarskeið hevur verið illa heitin, ella beinleiðis skaka.

## Public service?

Men vandi er í hvørjari vælferð. Hóast teir í hesum føri eru í fríari vinnu, so eru báðir rithøvundarnir at bókini "Skjót journalistin" knýttir at Sjónvarpinum, sum veitir eina almenna tænastu, rópt public service.

Kemst ikki uttan um, at rithøvundarnir fáa okkum at nema við spurningin, um ein public service miðil í verki er ein so stórur bági fyri fríum, avdúkandi journalistikki, at alment settu varðhundarnir venda miðilinum ryggin og kenna seg noyddan at fara til privatkapitalistisk forløg at fáa boðskapin um føroyska rotinskapin út til almenningin.

Ella liggur ein annar hundur grivin í hesum søguliga nýbroti upp undir jól? Fjaldu journalistisku rithøvundarnir vitalar upplýsingar fyri samstarvsfeløgum í Sjónvarpinum, so teir bert kundu brúkast til egnan, fáfongdan vinning seinni? Um so er, kann tað so hugsast, at aðrir journalistar bøla omaná vitalum upplýsingum, sum í løtuni verða hildnir loyniligir fyri teirra public service feløgum, fyri seinni at verða givnir út í privatum bókum?

Fer hetta bókmentunarliga nýbrotið, at elva til nýggjar mátar at veita almenninginum innlit og upplivingar? Er ein nýggjur marknaður og ein nýggj almenn fjølmiðlastøða um at taka seg upp í Føroyum, sum higartil hava verið so frálíkt vælsignaðar við hugnamentan?

Hetta eru spurningar vit kunnu seta okkum í jólakvirruni eftir at hava lisið søguligu bókina, sum hóast lýti, skapti nýggja skaldskapargrein í Føroyum. Og ikki sørt av undirhaldi eisini. Tøkk fái rithøvundarnir fyri henda várliga vind, nú hægsta vetrartíð er.

## Norðurlendskt samstarv

Alt síðani 1963, eitt ár eftir at danski Journalistháskúlin byrjaði, hava rektarar úr Norðanlondum hitst í eini journalistiskari samstarvsnevnd. Í dag eru 14 útbúgvingarstøð umboðaði í hesum rættuliga opna samstarvi. Lestrarstøðini bjóða øll akademiskar journalistútbúgvingar, sum vara í minsta lagi tvey ár.

Finska Ulla-Stina Westman, sum í mong ár var virkin í hesum samstarvi, hevur skrivað søguna um hetta virksemi (sí: www.jmk.su.se/norden). Hon vísir á, at finnar longu í 1925 kundu lesa journalistikk á lærda háskúlanum í Tammerfors, meðan sami møguleiki ikki stóð flestu norðbúgvum í boði fyrr enn fyrst í sekstiárunum.

Um hetta mundi var áhugin fyri norðurlendskum samstarvi nýsprottin og stórur á mongum økjum. Norðurlandaráðið hevði fyrsta ársfundin í Keypmannahavn í 1953 og 3 ár seinni kom Finnland upp í samstarvið og sum fráleið lagaðust teir karmar, sum vit í dag kenna sum hitt almenna norðurlendska samstarvið.

Journalistar stóðu tá í fremstu røð og sýndu einum eftirútbúgvingartiltakið, rópt "nordisk kursus", størsta áhuga. Hetta var eitt skeið, sum bygdi á hugmyndir hjá Erik Reske-Nielsen og varð hildið í Vennlystparkini í Århus, har Journalistháskúlin, kom at halda til, innan hann flutti á núverandi adressuna í Oluf Palmes Allé í sama býi.

## Mentunararbeiðarabólkur

Grundsjónarmiðið fyri hesum tiltaki er enn sum áður, alment at viðurkenna journalistar sum størsta einsháttaða mentunararbeiðarabólkin í Norðanlondum og støðugt tryggja, at ein kjarni í hesum stóra yrkisbólki altíð hevur áhuga fyri og innlit í dagførd norðurlendsk viðurskifti, eisini í evropeiskum og altjóða høpi.

Í dag eru 45.000 journalistar í Norðanlondum. Skeiðið, sum nú gongur á 46. ári, er miðleingjan í árliga virkseminum hjá stovninum Nordisk Journalistcenter (NJC), sum heldur til í somu hølum í Vennelystparkini, sum Pressens Uddannelses Center nú eigur.

## Bert ein føroyingur

Her hava allir norðurlendskir journalistar, eisini føroyingar, møguleika at verða við. Men í eini kanning, sum Den Journalistiske Efteruddannelse í 2001 gjørdi fyri NJC, varð staðfest, at bert heilt fáir føroyingar tóku av tilboðunum um journalistiska eftirútbúgving innan hesar karmar.

Kanningin, sum bygdi á spurnarbløð og samrøður, fevndi um tríáraskeiðið 1998-2000.

Hesi árini lótu fleiri enn 10.000 danskir journalistar, tað er ein triðingur av limatalinum í Dansk Journalistforbund, seg eftirútbúgva, meðan einans 6 úr Grønlandi og bert hin eini føroyski journalisturin helt tílíka eftirútbúgving vera neyðuga.

Avmarkaði áhugin stavar, sambært kanningini, frá vána sáttmálum, fjarstøðu og vantandi fígging. Men eisini tí positiva veruleika, at einstakir føroyskir og grønlendskir miðlar sjálvir hava hildið innanhýsis journalistisk eftirútbúgvingarskeið.

## Journalistiska handverkið

Allir teir spurdu grønlendsku og føroysku journalistarnir vildu hava tilboð um eftirútbúgving.

65% av teim spurdu í Grønlandi, vildu læra meir um journalistiska handverkið. Hetta eru nett teir, ið frammanundan hava journalistiska grundútbúgving. 40% vildu hava meiri bakgrundsvitan, meðan 10% høvdu áhuga í at læra fremmandamál.

85% av teim spurdu í Føroyum ynskja at eftirútbúgva seg innan journalistiska handverkið. Í samrøðupartinum í somu kanning sæst, at hetta er júst í tráð við ynski hjá øllum føroyskum tíðindaleiðarum. 50% vilja hava meiri bakgrundsvitan, meðan eingin áhugi er at læra fremmandamál.

## Á móðirmálinum

Kanningin, sum staðfestir stóran tørv á grundleggjandi journalistiskari venjing, mælir til, at skaptir vera tveir møguleikar fyri eftirútbúgving, ein fyri hvørt av londum Føroyar og Grønland.

Viðvíkjandi Føroyum verður sagt, at her eru miðlarnir burturav føroyskir og ikki tvímæltir, sum í Grønlandi. Tí eigur daglig undirvísing eins og allar journalistiskar uppgávur at vera á føroyskum. Í Grønlandi verður mett at danskir lærarar kunnu brúkast.

Framhaldandi verður sagt, at í Føroyum er eisini tann munurin, at allir journalistar arbeiða í sama parti av landinum og at tørvurin hjá øllum er hin sami, nevniliga dagførd útbúgving innan grundleggjandi journalistiskt handverk.

Í samrøðupartinum í kanningini verður sagt, at helvtin av føroysku journalistunum hava ikki útbúgving. Teir koma úr øðrum fakum og tí er tørvurin á journalistiskari grundútbúgving serliga stórur.

Eitt av bløðunum staðfestir eisini, at journalistar, ið viðgera ársroknskapir, hava ikki nóg gott fakligt innlit.

Blaðmannafelagið sigur um orsøkina til skortandi áhugan fyri eftirútbúgving vera kostnaðin, tá ein skal burtur í onnur lond og so manglandi avtalur við arbeiðsgevaran. Tí tað er hann, ið skal rinda, sigur felagið.

Almennu loftmiðlarnir hava roynt seg við einstøkum lokalum skeiðum, t.d. í samrøðuteknikki og dagligari, fakligari eftirmeting í eina tíð.

## Einasti tilverurættur

Frágreiðingin um tørvin á journalistiskum eftirútbúgvingum í Føroyum og Grønlandi endar við hesum orðum frá tíðindaleiðara í Sjónvarpinum: "Føroyskir journalistar verða útbúnir til danskar miðlar, so tað er torført hjá okkum at fáa fatur á teimum. Okkum tørvar føroyingar, tí vit senda á føroyskum og um føroysk viðurskifti. Tað er okkara einasti tilverurættur."

## Grønlendsk journalistútbúgving

Í Grønlandi fóru tey undir journalistútbúgving í 1982. Síðani hava fleiri enn 40 lesandi lokið prógv á grønlendska Journalistskúlanum. Tí eru grønlendingar við í norðurlendska samstarvinum fyri journalistisk útbúgvingarstøð.

Byrjar ein føroysk akademisk journalistisk útbúgving, sum varir í tvey ár, so er neyvan nakað til hindurs fyri, at eisini føroyingar kunnu verða við í hesum samstarvi og læra av teim drúgvu royndum, sum norðurlendsku grannar okkara hava.

Stjórin Sofia Geisler upplýsir, at í løtuni eru 17 lesandi, skift í 4 lestrarbólkar. - Oftast verða 7-8 nýggir næmingar tiknir inn á skúlan hvørja ferðina, tí fleiri praktikkpláss eru ikki í landinum, sigur hon. Sofia Geisler umboðar Grønland í áðurnevnda norðurlendska samstarvi.

– Vanliga verða nýggir næmingar tiknir inn um heystið, men hesuferð er freistin at søkja sett til 1. februar 2004 og eg vænti fleiri umsóknir enn nakrantíð, sigur stjórin.

Í starvsvenjingartíðini, sum er hálvtannað ár, skulu tey lesandi arbeiða við tíðindum, tað veri seg á einum blaði, í útvarpi ella sjónvarpi. Føstu støðini, sum taka lesandi, eru tey bæði tíðindabløðini, sum koma út um alt landið og so grønlendska útvarpið/sjónvarpið. Útbúgvingin varir hálvtfjórða ár.

Ætlanin er, at leggja verandi útbúgving um til eina sonevnda professiónsbachelorútbúgving, sigur Sofia Geisler og leggur aftuart, at tá verður útbúgvingin partur av lærda háskúlanum í Nuuk og fer í størri mun at fevna um ástøðilig viðurskifti og í minni mun um starvsvenjing, sum bert verður í eitt ár. Tilsamans fer grønlendska journalistútbúgvingin tá at vara 4 ár.

Tveir faklærarar eru í føstum starvi á skúlanum og harafturat er samstarvsavtala við lærda háskúlan um lærarar, sum undirvísa í samfelagslæru og máli og so eru eisini gestalærarar t.d. frá Journalistháskúlanum í Århus. Skúlin hevur trý undirvísingarhøli at ráða yvir og eina útvarpsstovu, sum eisini hevur sjónvarpsútgerð og Mac telduútgerð at gera bløð við.

Liðin eru 4 ár síðani Sofia Geisler tók við stjórastarvinum á Journalistskúlanum í Nuuk, har hon sjálv leyk prógv í 1990. Frammanundan hevði hon starvast sum tíðindaleiðari í grønlendska útvarpinum og sum kunningarleiðari hjá Royal Greenland.

## Føroysk journalistútbúgving?

Hóast miðlarnir í dag ganga nógv nærri enn teir gjørdu fyri bara fáum árum síðani, er langt eftir, um vit framhaldandi skulu taka fólkaræðisligu hugsanina hjá pressuni sjálvari í álvara.

Komandi árini fara at krevja nógv av tíðindafólki og teimum, sum arbeiða í miðlunum. Eins og lærarastarvið, so er journaliststarvið eyðkent við at vera annara vegna. At formidla ein boðskap og ikki fara av kós. Hvørki politiskt, religiøst ella á annan hátt.

Nú val er í hondum og journalistar aftur sleppa at royna seg, er vert at hyggja aftur í bókina "Skjót journalistin":

"Okkara uppgáva er vegan veljaran, sum skal gjalda alt gildið, at seta spurningar. Hetta skulu vera spurningar, sum gera, at veljarin kann kenna seg tryggan. Og hetta skulu vera spurningar, sum verða settir vegna hyggjaran ella skattgjaldaran og ikki sum partur av politiskum ella persónligum áhugamálum ella sjónarmiðum" (bls. 150)

Men so leingi vit hvørki hava gransking, útbúgving, ella ein livandi kritikk á hesum øki, er trupult at hugsa sær, at føroysku miðlarnir framhaldandi kunnu bera fólkaræðisligu hugsanina fremst í teirra skjaldrarmerki.

Bókin "Skjót journalistin" er kærkomna undantakið. Og so sjónvarpsmaðurin, ið vælgrundaður sóknaðist eftir eini árinskanning, innan SEV fer undir næstu verkætlanina á Eiði. Nei, her seta vit dagsskránna, segði SEV. Eingin árisnkanning innan, men bara eftir. Og har stendur spurningurin. Settur av fjórða statsvaldinum, meðan hin trý halda frí.

"Journalistar og vísundafólk hava skyldu at brúka hvør annan. Men gera tað ikki" staðfestir Bergur Hansen í grein í Dimmu og Sosialinum.

Miðlanir mugu fáa atstøður at gera eitt væl grundað arbeiði, fólkaræðinum at frama. Tástanni kunnu vit tosa um eina pressu, sum er nær í námindi av fjórða statsvaldinum. Einum valdi, ið summir politikarar í summum førum viðurkenna, t.d. Dimma, sum í somu útgávu (9. desember) hevur hesa almennu áheitan: "Hann (Høgni Hoydal) heitir í sama viðfangi á fjølmiðlar og onnur, um at hava eitt vakið eyga við landsstýrinum, soleiðis at illgrunasamt virksemi ikki sleppur at henda áðrenn nýggj samgonga er skipað."

Bólturin liggur í størri mun enn nakrantíð á hálvuni hjá miðlunum. Uppgávan er at fara eftir honum. Bóltinum.

Gott nýggjár og góðan byr, øll sum halda fram í somu rillu og øll sum kasta seg á bláman – uttan selar og reim. Spyrst, so livst.



# Úr Spaniu til Oyrar at verða stjóri

**Fyrrverandi stjórin í Føroya Fiskasølu, Hans Johannes á Brúgv, er settur nýggjur stjóri á fyritøkuni, O.C. Joensen á Oyri. Fyritøkan hevur rækjuvirkið, skeljavirkið, ein skeljabát og ein rækjutrolara**

STJÓRASETAN

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Hans Johannes á Brúgv, fyrrverandi fiskasølustjóri, er nú settur stjóri á fyritøkuni, O.C. Joensen á Oyri*

Hans Johannes á Búgv loysir Sofus Poulsen av, sum er settur stjóri á Kollafjord Pelagic.

Nýggi stjórin á rækju-og skeljavirkinum, sum er settur frá 1. januar, sigur, at uppgávan á Oyri verður sera spennandi.

– Gjøgnum mítt arbeiði á Fiskasøluni, kenni eg sjálvsagt nakað til virksemið hjá O.C. Joensen, men hetta er í fyrsta lagi eitt framleiðsluvirksemi, og tí er uppgávan ikki minni spennandi, sigur hann.

## Í Spaniu

Seinasta árið hevur Hans Johannes saman við konuni og fýra børnum búð uttanfyri spanska býin, Valensia.

Hann sigur, at hetta hevur verið ein ógvuliga lærurík tíð.

– Eg havi fingist við sølu av fiski og skeljafiski, sum føroyingar selja í Spaniu.

Hann vísir á, at tey búðu í einum býarparti, sum telir eini 500-600 hús.

– Vit búðu ógvuliga væl og kendu okkum trygg, har vit vóru. Tey trý elstu børnini, 9, 11 og 14 ár, gingu í sponskum skúla, meðan konan var heima hjá tí yngsta, sum er 3 ár.

Hans Johannes sigur, at nú tey komu heimaftur, tosa tey trý eldru børnini flótandi spanskt.

– Eg helt, eg dugdi nakað av sponskum, tá ið vit fluttu niður, men eg noyddist at ásanna, at hetta var ógvuliga beskegið.

Hann sigur, at hann hevur verið á tveimum intensivum skeiðum í sponskum, og nú uppundir endan av tíðini í Spaniu gekst væl at samskifta á sponskum.

– Konan hevur eisini fingið væl burtur úr málinum við at tosa við foreldur at øðrum børnum og onnur, tey høvdu samband við.

Hans Johannes ásannar, at konan hevur gott máloyra, sum tikið verður til.

## Nógvar tjóðir

Hann sigur, at á leiðini, har tey búðu, búgva nógv ymisk fólkasløg, og tí lærdi familjan ein heilan hóp hetta eina árið.

– Umframt spaniólar, búgva eitt nú japanesarar, kinverjar, arabarar og eisini indiánarar í hesum býarparti.

Hans Johannes sigur, at spaniólarnir á hesum leiðum tosa ikki enskt, heldur ikki tey lærdu.

– Alt var øðrvísi, og mentanin kann ikki samanberast. Størsti munurin var tó veðrið, sum er heitt og gott í Spaniu í mun til veðurlagið í Føroyum.

Hann sigur, at skal tú fella væl inn í samfelagið, er neyðugt at vera burtur í meira enn eitt ár. Annars kann tað kennast eitt sindur einslig viðhvørt.

– Og tó; vit trivust væl, eisini børnini, men tað var hart í byrjanini, tí tú kendi ongan, og alt samskiftið gekk fyri seg á sponskum.

Spurdur, um tey kendu seg trygg, sigur Hans Johannes, at tað gjørdu tey.

– Her vóru lokalar vaktir, sum syrgdu fyri, at alt gekk væl fyri seg. Hetta var ikki sjálv løgreglan, men eitt slag av security.

Hans Johannesen heldur tó ikki, at nógvur kriminalitetur var á leiðini, og hann veit at siga, at kriminaliteturin í Spaniu er minni enn eitt nú í Danmark.

– Nú verður tað so henda nýggja avbjóðingin sum stjóri hjá O.C. Joensen á Oyri, ið eg fari at leggja meg eftir, sigur hann.